# Fráfarðingarsamkoma

Í samband við at Jonny Joensen, leiðari og Andreas Joensen fara úr starvi á Hotel Tórshavn, verður hildin fráfaringarsamkoma á Hotel Tórshavn, Gothersgade 160, 4.s.th.

**Fríggjadagin 07. januar**
**kl. 14.00 – 17.00**

ALMANNA- OG HEILSUMÁLASTÝRIÐ
*STARVSFÓLKADEILDIN*





»Gult ljós«

**Nýtt skeið byrjar 6. januar**

**Tvøroyra Teori- & Koyriskúli**
v/Áka Dimon
Tlf. 371180 & 286093
Koyrikort til persónbil & motorsúkklu



**BT-LYFTIVOGNAR**
*eru á goymslu*

**Føroya mest seldi lyftivognur vegna góðsku**




**Kaj Andreasen Pf.**
*Tlf. 31 56 00*


LØGMANSSKRIVSTOVAN

# Starv sum fulltrúi

## á Løgmansskrivstovuni

Ein av okkara fulltrúum fer í farloyvi og verður eitt tíðaravmarkað starv sum fulltrúi á Løgdeildini í Løgmansskrivstovuni í eitt ár, frá 1. februar 2000 at rokna, tí við hesum lýst leyst at søkja.

**Høvuðsuppgávur**
Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru at gera lógarsmíð á teimum økjum, ið verða umsitin av løgdeildini, ger av løgfrøðiligum responsa, eftirkanning av lógaruppskotum hjá miðfyrisitingini og aðrar løgfrøðiligar uppgávur t.d. menning og samskipan av lóggávuarbeiðinum í miðfyrisitingini.

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava løgfrøðiligt embætisprógv.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar eru vælkomnir at seta seg í samband við Rúna Joensen, deildarstjóra, fyri at hoyra meira um starvið, tlf. 351010.

**Vit kunnu bjóða**
Talan er um fakliga krevjandi, men samstundis eisini spennandi starv við nógvum ymiskum arbeiðsuppgávum.

Umsóknir við prógvum, cv.o.ø. skulu sendast:

**Løgmansskrivstovuni**
**Postrúm 64**
**110 Tórshavn**

og vera á Løgmansskrivstovuni í seinasta lagi 14. januar 2000.

**Løgmansskrivstovan** er fyrisiting hjá løgmanni og varaløgmanni. Løgtingsskrivstovan er skipað í 3 deildir og tvær tænastueindir og hevur í høvuðsheitum tværvegis og samskipandi uppgávur sum landstýrisfundir, uttanlandsmál, umboðan, løgmál, starvsfólkapolitikk, fyrisiting, nýskipan og sjálvstýrismál.

# Søkt verður eftir lærara til Træ-deild skúlans

Søkt verður eftir lærara til træ-deildina. Starvið, sum er fulltíðarstarv, verður at seta sum skjótast.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum húsasmiður og hava minst 2-ára starvsroyndir í hesum yrki. Fyrimunur er at hava víðari útbúgving.

Lønin verður samb. sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til skúlan á tlf. 311957.

Umsóknir til starvið skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 17. januar 2000. Við umsóknini skal fylgja avrit av prósvkjølum og møguligar starvsváttanir. Umsóknin skal merkjast »lærari til Trædeildina«.

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75, P.o.b. 239,
FO-110 Tórshavn


# FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT




**GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR**

**Tlf. 32 22 22**


# Sosialistiskt ungmannafelag

Lega fyri øll áhugaði millum 15-30 ár verður í gistingarhúsinum í Øravík í vikuskiftinum 14.-16. januar.

Nærri boð fáast við at ringja á tlf.: 311424, 281118, 321011, ella við at skriva til rannva78@forum.dk ella fia@sansir.fo

**Nevndin í SU**

*Lýsið í* **sosialinum**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2664, **Sp/f Lido Seafood, 220 Skálavík.**

**Viðtøkur broyttar:** 25.11.1999.
**Kapitalur:** Hækking við kr. 500.000,00 til kr. 1.300.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 500.000,00 til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 4. januar 2000

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1630, **Sp/f Myndir, 100 Tórshavn.**

**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Gudmundur Skæling, Millum Horna 10, 100 Tórshavn.
Innkomin sum sum stjóri: Svend V. Hentze, Traðarvegur 18, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 4. januar 2000

Kristin Balle



# Aðalfundur

Umboðsráðið boðar til aðalfundar í B36 húsinum

**leygardagin 19. feb. 2000**
**- kl. 13.00**

Dagskrá samb. lógum felagsins.
Uppskot, ið ynskjast viðgjørd á aðalfundinum, skulu vera send Føroya Pedagogfelag att. Umboðsráðið - í seinasta lagi 14 dagar áðrenn aðalfundin - t.e. leygardagin 5. februar.

**Umboðsráðið**
**Føroya Pedagogfelag**

# Sjúkra-/ og frítíðaravloysari

Søkt verður eftir sjúkra-/frítíðaravloysara at byrja 12. apríl 1999 ella eftir avtalu.

Stella Maris Vøggustova er ein stovnur við 52 heildagsplássum til børn í aldrinum 0-3 ár.

Mál okkara er at geva hesum smáu ein góðan og tryggan karm um ein gevandi og mennandi gerandisdag. Hevur tú hug at hjálpa okkum við tí?

Lønar- og setunarviðurskiftir sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag.

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum skal verða stovninum í hendi í seinasta lagi 8. apríl 1999.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til stovnin.

**STELLA MARIS VØGGUSTOVA**
Varðagøta 11
Boks 1202
FO-110 Tórshavn
Tlf. 312853 • Fax 316954




MARCO POLO
søkir eftir
SERVITRISU m/k
Áhugaði kunnu venda sær til
Tel. 213430

MARCO POLO
Smoga 1140 • FO 110 Tórshavn
Tel. 313430 • Fax. 313220


# Vinnararnir av teknikappingini eru:

Vinnarin av teknikappingini 22.12.99 er:

Ragnhild Dam
Varðagøta 53
100 Tórshavn
Hon hevur vunnið eitt gávukort kr. 300,- frá Handilskjarnanum.

Vinnarin av teknikappingini 29.12.99 er:

Milja Hanusardóttir
Berjabrekka 103
100 Tórshavn
Hon hevur vunnið eitt spæl frá Suðuroyar Sparikassa.

Hans Kristoffur Lind Rasmussen
V.U. Hammershaimbs gøta 14
100 Tórshavn
Hann hevur vunnið eitt gávukort kr. 400,- til ein handil í miðbýnum.

Vinningurin kann avheintast á Kunningarstovuni.

**Kunningarstovan**

# Pedagogur

Vøggustovan við Velbastaðvegin søkir eftir einum pedagogi 25 tímar um vikuna, at byrja 1. februar 2000 ella eftir nærri avtalu.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, sum er normeraður til 42 vøggustovubørn. Tríggjar stovur hava 10 børn hvør og ein stova hevur 12 børn.

Tann, ið settur verður skal hava góð samstarvsevnir og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum.

Um eingin pedagogur søkir starvið, verður tað fyribils sett við fólki uttan pedagogútbúgving.

Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal verða stovninum í hendi í seinasta lagi 19. januar 2000.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran Inga-Mariu Sørensen ella varaleiðaran Elsu Nielsen.

**Vøggustovan við Velbastaðvegin**
Velbastaðvegur 39
100 Tórshavn
Tlf. 314379 • Fax 321179

# Pedagogur

Søkt verður efitr 1 pedagogi 40 tímar um vikuna, at byrja 1. februar 2000 ella eftir avtalu. Tað verður fyribils til juli 2001. Starvið er á stovu við 8 børnum í aldrinum 0 – $1^1/_2$ ár.

Stella Maris vøggustova er ein stovnur við 52 heildagsplássum til børn í aldrinum 0 – 3 ár.

Mál okkara er at geva hesum smáu ein góðan og tryggan karm um ein gevandi og mennandi gerandisdag. Hevur tú hug at hjálpa okkum við tí?

Lønar- og setunarviðurskifti sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag.

Skrivlig umsókn við prógvi og møguligum viðmælum skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi 21. januar 2000.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til stovnin.

**STELLA MARIS VØGGUSTOVA**
Varðagøta 11
Boks 1202
FO-110 Tórshavn
Tlf. 312853 / Fax 316954

# Maskinmeistari ella handverkari søkist til Elfelagið SEV

Søkt verður eftir einum maskinmeistara ella handverkara til verkstaðið hjá SEV í Vestmanna.

Arbeiðið fatar um hald av teimum ymisku amboðunum hjá SEV, herundir kompressarar, borimaskinur, gravimaskinur o.a.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving og royndum innan nevnda arbeiðsøki hava fyrimun.

Lønin verður sambært avtalu við avvarðandi yrkisfelag.

Umsókn saman við lærubrævi/prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til Elfelagið SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi týsdagin, tann 25. januar 2000.

**Elfelagið SEV**

*Halt* **sosialin**